


sansir.fo

**Kundin í miðdepilin, er týðandi mál í Tryggingarfelagnum Føroyum. Ein liður í at røkka hesum máli er, at øll skaðaviðgerð er miðsavnað á eini deild í Tórshavn, fyri á henda hátt at tryggja eina fakliga góða og einsháttaða viðgerð av skaðum. Til hesa deild verður søkt eftir leiðara.**

Arbeiðsøkið er fjølbroytt og spennandi. Tað fevnir í høvuðsheitum um at hava dagligu leiðsluna av skaðaviðgerðini og teimum starvsfólkum, sum har starvast, og styrkja kundatænastuna innan skaða, soleiðis at kundin í øllum viðurskiftum fær eina góða tænastu.

### Uppgávurnar fevna m.a. um

- at leiða og fordeila arbeiðið viðvíkjandi øllum privatum og vinnuligum skaðum
- at hava dagligu starvsfólkaábyrgdina av áleið 12 starvsfólkum og skiftandi næmingum
- at taka avgerðir í serliga truplum málum
- at støðugt dagføra arbeiðshættir og mannagongdir innan skaðaviðgerð

### Vit vænta

- at tú hevur hug og evnir at ganga á odda, og ganga nýggjar leiðir
- at tú hevur lætt við at samstarva, og dugir at fáa starvsfólk at virka væl saman sum eina eind
- at tú ert tænastusinnað/ur
- at tú megnar at taka avgerðir og fremja hesar í verki
- at tú ert fyrikomandi og fryntlig/ur

### Fyrimun hevur umsøkjari sum

- hevur leiðsluroyndir
- hevur løgfrøðisliga útbúgving ella royndir
- er væl fyri tryggingarfakliga.

### Lønar-og setanartreytir

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Yrkisfelagið Trygdina og Arbeiðsgevarafelagið fyri fíggjarstovnar í Føroyum. Lønin verður ásett í mun til royndir og førleika.

Er hetta nakað fyri teg, ella hevur tú spurningar til starvið, kanst tú seta teg í samband við Helga L. Petersen, deildarstjóra á tlf. 34 56 00 ella við at senda teldupost til hlp@trygging.fo.

Umsóknarfreistin er 30. januar 2009 kl. 12.00.

Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:
Tryggingarfelagið Føroyar
Starvsfólkadeildin
Postsmoga 329
FO-110 Tórshavn

ella umvegis www.trygging.fo

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
*- so ert tú tryggari*




FT Samskifti mennir, marknaðarførir og selur tænasturnar, sum Føroya Tele veitir fyritøkum og einstaklingum. Marknaðar- og produktdepilin hevur ábyrgd av produktum og tænastum og skal tryggja, at hesi verða marknaðarførd á besta hátt.

Vit kunnu bjóða einum komandi starvsfelaga eitt spennandi arbeiðspláss, har avbjóðandi uppgávur og menningarhugur eru í hásæti. Tann, sum fær starvið, fær møguleika at seta sítt sjálvstøðuga merki á arbeiðið og fer at arbeiða saman við dugnaligum starvsfólkum.

**Arbeiðið fevnir um at:**

- Samskipa menningina av okkara heimasíðum
- Samskipa og framleiða tilfar til heimasíðurnar, soleiðis at tær eru greiðar, dygdargóðar og kundavinaligar
- Dagføra heimasíðurnar
- Kunna starvsfólkini á Føroya Tele um okkara produktir og tænastur umvegis intranetið
- Gagnnýta heimasíðurnar á ein slíkan hátt, at tær skapa meirvirði fyri fyritøkuna

**Vit ímynda okkum, at tann, ið fær starvið:**

- Dugir væl at samskifta skrivliga og munnliga
- Hevur royndir í ella hugskot til at menna innihald á heimasíðum og í at brúka heimasíður til at røkka málbólkum
- Hevur lætt við at gera hugskot til veruleika og sær møguleikar heldur enn forðingar
- Dugir at arbeiða miðvíst við uppgávum, verkætlanum og tíðarfreistum
- Dugir væl at arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- Hevur viðkomandi útbúgving

**Umsóknir og starvsviðurskifti**
Starvið verður sett sum skjótast. Lønin verður eftir avtalu.

Tú fært meira at vita um starvið frá Jónhild Rasmussen, leiðara á Marknaðar- og produktdeplinum, á tel. 243302 ella á jr@ft.fo. Eisini ber til at venda sær til starvsfólkadeildina á tel. 303030.

Umsóknir við CV og avritum av prógvum og viðkomandi skjølum skulu vera starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi 10. februar 2009 og skulu sendast til:

Føroya Tele
Starvsfólkadeildin
Postrúm 27
110 Tórshavn

ella til:
starvsfolkadeildin@ft.fo

FT Samskifti er dótturfelag í Føroya Tele. Í felagnum er øll kundarøkt, øll søla og alt samskifti við privatkundar og vinnukundar, alt GSM-samskifti og øll staðarútgerð til fastnettelefoni og breiðband. Í felagnum starvast gott hundrað fólk. Tænastur frá FT Samskifti verða marknaðarførdar undir navninum Føroya Tele.

FØROYA TELE

SENDISTOVAN